# Einglarnir fáa tvey prosent um árið

**Tá tað verður dropadrivið í sambandi við whiskyframleiðslu, svinna tvey prosent av løginum um árið. Gott einmalt whisky liggur so at siga ongantíð undir 10 ár á fati, so svinnið verður í minsta lagi 20 prosent. Hetta svinn verður tó væl brúkt, tí talan er um tað, sum skotar rópa "The angel share". Vælkomin til eina føroyska ferð inn í whisky og whiskymatgerð**

WHISKYKVØLD HJÁ EINMALT

*Orð og myndir: Leif Láadal*

Ronnie, ein av nevndarlimunum í áhugafelagsskapinum EinMalt, sum er felag fyri whisky-fjepparar, smekkar tvær ølfløskur so hart saman, at veruligur vandi er fyri, at tær brotna og smildrast inn yvir flott uppsetta borðið. Tað sigur klokk klokk. Ikki so hart, sum tað vildi gjørt, um hann brúkti ein gaffil ella ein knív og so eitt glas ella eina flösku, men djúpa glasljóðið er kortini somikið hart, at fólk steðga við prátinum og fara lurta.

Vit eru stødd í hølunum hjá Starvsmannafelagnum í Havn. Evnið er whisky og matur, ella kanska rættari matur og whisky. Talan er um fyrsta tiltak av sínum slagi nakrantíð í Føroyum, og Ronnie fortelur harafturat, at hann ikki veit um meira enn eini fýra-fimm tílík tiltøk, sum hava verið í øllum kongaríkinum.

## Orakkul

Tað er nýstovnaði felagsskapurin - sum kortini hevur eitt gott ár á baki - EinMalt, ið skipar fyri. Hugskotið er at fáa tveir góðar kokkar at seta saman eina matskrá við fimm rættum, sum antin taka støði í fimm sløgum av whisky, ella brúka whisky í sjálvari matgerðini.

Ímillum rættirnar fer Ronnie Thomassen so at greiða frá um tey sløgini av whisky, sum skulu roynast afturvið matinum, og annars um whisky sum heild. Kokkarnir sjálvir fara at greiða frá mati sínum.

Og tað er ikki ov nógv at siga, at Ronnie er eitt satt orakkul, tá tað snýr seg um whisky. Summar upplýsingar seta seg tó fastari í minnið enn aðrar, og ein tann, sum brennir seg rimmarfast, er tann um "einglana lut".

Eftir at hava greitt frá, hvussu whisky verður framleitt, hyggur Ronnie eitt sindur harmur út yvir teir 40 fjepparарnar og staðfestir, at tvey prosent av løginum dampar úr fatinum um árið, tá tað verður lagrað. Og tað er sjálvsagt synd, men hesin partur fer kortini ikki heilt til spillis, sigur hann, tí hann hevur ivaleyst við sær, at einglarnir so kátir kunnu spæla upp á sínar hørpur har uppi.

## Kvennkyn

Tá tosað verður um whisky eru tvey álvarslig skilmørk, um vit tosa um Skotland: Einmalt og blended. Í høvuðsheitum er talan um, at eitt dropadriv, ella brennivínsvirki, um ein vil, sum oftast framleiðir eitt slag ella bæði trý av einmaltum whisky. Hetta whisky verður antin stoytt á flösku og selt sum einmalt, ella selt í stórum til blandarar, sum so blanda og selja síni "blend" á heimsmarknaðinum. Tann størsti og kendasti blandarin er fyritøkan Johnny Walker, men tað finnast túsund onnur sløg.

Ronnie er óførur at siga frá um bæði skotskt, írskt, amerikanskt og enntá japanskt og svenskt whisky, men tú hoyrir væl á honum, hvørjum hjartað bankar fyri. Tað ger tað fyri "teirri skotsku einmaltu whiskyini". Hann brúkar kvennkyn, tá hann tosar um whisky.

Og fyri at halda okkum til kynið, so er tað ikki fullkomiliga munkakent í felagshølunum hjá Starvsmannafelagnum hetta leygarkvøldið miðskeiðis í mars. Tvær kvinnur sita til borðs saman við 38 monnum, umframt at annar kokkurin er kvinna, og tvær ungar kvinnur taka sær av at borðreiða.

## Gamalt

Ofta verður sagt, at tess eldri eitt whisky er, tess betri, men sambært borðstjóranum er hetta ikki altíð rætt.

"Ein whisky verður í flestu førum eitt sindur mjúkari við árunum, og hon verður harafturat meiri kompleks í samanseting av smakki, men tað finnast nógvar 10 ára gamlar einmaltar whiskyir, sum eftir mínum tykki eru líka góðar ella betri enn nógvar 18 ára gamlar, fortelur Ronnie og leggur afturat við einum skeivum brosi:

"Og hesar heilt gomlu eru sum oftast bara til rík ferðafólk, ið

***Matarskráin við sløgum av whisky, ið vórðu borðreidd afturvið:***

***Jákupsskeljar V/ Blommu Melón og Safran***
***Glenkinchie 10***

***Kolturskjøt v/ Gularót Traneber Manchego***
***Cragganmore 12***

***Lamb, roykt, Omega Karsi***
***Talisker 10***

***Búffur av springaratvøsti v/ rótfruktum***
***Lagavulin 16***

***Whisky-fromaga við góðaráð***
***Glenmorangie 10***



*Roykt lambskjøt borðreitt á basalti*



*Tey fimm sløgini, sum vóru afturvið matinum*



*Gutti Winther, kokkur, ger perukúlir*